Fra:	Eli Christiansen
Til:	Jóannes N. Dalsgaard; Umhvørvismálaráðið
Cc:	Bjarni Askham Bjarnason; Fíggjarmálaráðið
Emne:	SV: Til ummælis - Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn - Freist at gera viðmerkingar 14.03.2023
Dato:	týsdagur, 14. mars 2023 16:20:14
Vedhæftede filer:	image002.jpg image004.png image003.png

Til Umhvørvismálaráðið

Fíggjarmálaráðið hevur fingið uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunnin til hoyringar.

Sambært kapittul 4 b í lógini hevur Húsalánsgrunnurin heimild at læna tilsamans upp til 700 mió. kr. til bústaðabygging. Í § 8 c eru serligar treytir ásettar um 450 mió. kr. Av tí upphæddini skulu 250 mió. kr. fíggja bústaðabygging kring landið saman við øðrum íleggjarum, tó soleiðis at landsstýrismaðurin kann loyva Húsalánsgrunninum at fara undir verkætlanir einsamallur, um íleggjarar ikki hava áhuga, ella at trupult er at fáa semju við íleggjarar.

Uppskotið snýr seg um at strika kravið um, at aðrir íleggjarar skulu luttaka saman við Húsalánsgrunninum at fíggja nevndu bústaðarbygging. Í staðin fyri hevur Húsalánsgrunnurin møguleika at fíggja byggiverkætlanir saman øðrum íleggjarum. Í tílíkum førum skal grunnurin, sum áður, virka undir somu treytum, sum eru fyri aðrar partar í verkætlanunum.

Fíggjarmálaráðið heldur, at tað er skilagott, at tað ikki skal vera eitt krav, men heldur ein møguleiki, at fíggja byggiverkætlanir saman við øðrum.

Viðmerkjast skal tó, at Húsalánsgrunnurin hevur ein avkastmyndil, sum krevur lægri vinning og yvir longri tíð enn hjá flestu privatu íleggjarunum. Tað hevur við sær, at Húsalánsgrunnurin í lítlan mun fær avkast av gjørdum íløgum til at gera nýggjar íløgur. Roknast má tí við, at mestsum allar verkætlanir hjá Húsalánsgrunninum skulu fíggjast við meira láni so hvørt. Tað krevur so lógarbroyting, um farast skal upp um lánsloftið, sum er nevnt omanfyri. Fíggjarmálaráðið mælir til at meta um avkast- og fíggingarmyndilin hjá Húsalánsgrunninum, um hann er haldførur og ikki leggur ov stórar lánsbyrðar á landið í komandi árum.

Vinarliga – With regards

Eli Christiansen
Fulltrúi / Advisor
Office: +298 352020
Mobile: +298 226200
eli@fmr.fo

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance
Tinganes / FO-100 Tórshavn / Faroe Islands
Office: +298 352020 / fmr@fmr.fo / www.fmr.fo